Heilsan til Napoleon Nolsøe:

# Tú gav mongum neyðugt grundarlag í lívinum

**– Tey eru nógv, sum hava tær og kvøldskúlanum fyri at takka, at tey ikki steðgaðu upp í útbúgvingarskipan landsins, men kundu koma í kvøldskúlan at fáa tað neyðuga grundarlagið, sum manglaði segði Fritleif Henriksen m.a. á móttøku í sambandi við, at Napoleon Nolsøe leggur frá sær**



*Tveir mans lyfta arvin eftir Napoleon Nólsoy: Bo Isholm, nýggjur stjóri í Tórshavnar Musikkskúla, Napoleon Nólsoy, fráfarni stjóri í Tórshavnar Musikkskúla og Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla og Fritleif Hendriksen, nýggjur stjóri í Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

## LEGGUR FRÁ SÆR

*Lagt til rættis: Jan Müller*
*Myndir: Eirikur Lindenskov*

Fíggjadagin í farnu viku var móttøka í Müllars pakkhúsi í Havn, nú leiðarin á Tórshavnar Kvøld- og ungdómsskúla í 30 ár, Napoleon Nolsøe leggur frá sær. Mong høvdu leitað sær í hetta hugnaliga og gamla umhvørvið fyri at takka tí siðiliga, fryntliga og evnaríka skúlamanninum fyri gott samstasrv og fyri tað slóðbrótandi arbeiði, sum Napoleon hevur staðið fyri øll hesi árini. Millum røðarnar var eisini annar av eftirmonnunum hjá Napoleon, Fritleif Henriksen.

Hann helt fyri, at tey umleið 30 árini Napoleon hevur verið leiðari á Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla, og nakað styttri áramál eisini leiðari á Tórshavnar Musikkskúla, hevur ikki bara verið stórur vøkstur, men eisini fruktað væl, bæði í tónleiki, skapandi list og handverki.

– Tey eru nógv, sum hava tær og kvøldskúlanum fyri at takka, at tey ikki steðgaðu upp í útbúgvingarskipan landsins, men kundu koma í kvøldskúlan at fáa tað neyðuga grundarlagið, sum manglaði – og tey, sum standa hjarta tínum nær, tey veiku, rørslutarnaðu og menningartarnaðu hava fingið sín góða part av orku skúlans segði Fritleif og helt fram:

– Lívsverk títt ber boð um ein hegnismann, og skal eg her stutt taka fram nakrar av tínum góðu eginleikum:

Tú ert ein vinsælur maður, blíður og fyrikomandi. Tú hevur hjartað á røttum stað, altíð til reiðar at hjálpa og finna loysnir og útvegir. Tú dugir ómetaliga væl at fáast við fólk. Eisini dugir tú ótrúliga væl at fáa starvsfólk skúlanna at gera sítt ítasta í arbeiði sínum. Og so ikki minst hesi sjáldsomu evnini – sum so nógv fólk kundu hugsað sær at átt – hesi evnini at fáa alt at bera til og eydnast, líka mikið hvat.

Arbeiðsamur er tú útyvir øll mørk, so um ikki baklandið var so gott, at tú fekk Gnippu til konu, so hevði tað yvirhøvur ikki borið til. At tú eisini hevur álit millum manna vísir henda lítla søgan, eg skal fortelja tykkum:

Musikkskúlin á Frúutrøð, har skrivstovur skúlanna eru, er granni hjá læknaviðtaluhølunum í Jónas Broncksgøtu.

Ein morgunin Napoleon kemur eftir gongini, situr ein maður har og bíðar. Hann er kvikur at venda sær til Napoleon, brettir aðra buksubrókina upp um knæ, og vil hava Napoleon at siga sær, hvat beininum feilti.

Um hann fekk nakra recept henda dagin veit eg ikki, men eg eri vísur í, at hann fekk nógv góð ráð og góð orð við sær á vegnum.

Einhvør endi hevur eina nýggja byrjan við sær. Nú tit bæði Napoleon og Gnippa hava lagt frá tykkum, fari eg at takka tykkum og ynskja tykkum alt tað besta mína vegna og vegna okkum á Frúutrøð segði Fritleif í røðu síni.



*Gnippa og Napoleon Nólsoy*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*



*Sum vera man var nógvur tónleikur at hoyra á móttøkuni fyri Napoleon Nólsoy fríggjadagin. Her eru tað næmingar í Tórshavnar Musikkskúla, sum framføra*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*



# Ongantíð havt betri starvsbróður

**Í mínari 13-ára virkistíð í musikkskúlaheiminum hevði eg ongan betri starvsbróður í tí umsitingarliga enn Napoleon Nólsoy. Ikki bara var hann altíð vinsælur at koma á tal við, men hansara lutur lá ongantíð eftir, tá tøk skuldu takast, tað veri sær í tí praktiska so væl sum í tí fíggjarliga segði Ólavur Hátún í fráfaringarrøðu í Havn í farnu viku**



*Nógv fólk vóru samankomin í Müllers Pakkhúsi fríggjadagin, tá móttøka var í sambandi við, at Napoleon Nólsoy hevur lagt frá sær sum stjóri fyri Tórshavnar Musikkskúla og Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla*

*gnippa og napoleon*

## FRÁFARINGARØÐA

Millum teirra, sum bóru fram kvøðu og tøkk á fráfaringardegnum hjá Napoleon Nólsoy í Müllers Pakkhúsi fríggjadagin var eisini Ólavur Hátun, eitt av undangongufólkunum í føroyskum tónleikalívi. Hann segði m.a.:

– Við hetta hátíðarhøvið í sambandi við, at Napoleon Nólsoy hevur lagt frá sær sum leiðari av kvøldskúlanum og musikkskúlanum, havi eg hug at siga nøkur orð. Ikki havi eg kent Pola so langt aftur í tíðina, men hoyrdi ofta, helst í 70-árunum, um henda Napoleon Nólsoy, sum hevði fingið kvøldskúlan at blóma sum ongantíð áður. Sum skiltist, hevði hann eftir fáum árum breitt hetta kvøld- og ungdómsskúlavirksemi so at siga út um allan býin. At hann eisini var komin inn á lærara- og venjingarskúlaøkið visti eg ikki, fyrr enn eg ein dagin møtti sera fryntligum manni á gongini har. Tað vísti seg at vera tann gitni Poli, sum tá eisini var komin inn um skúlagátt úti á Frælsinum við sínum kvøldskúla. Eisini har royndist tað sum at rætta einum vissum harra lítlafingur, tí tað var so skjótt, at kvøldskúlaundirvísing var so at siga í hvørjari holu úti hjá okkum eisini.

Tað var tað tí lætt at skilja, at býráðið hevði slíkt álit á hesum dugnaliga og ágrýtna skúlaleiðara, at teir eisini lótu honum musikkskúlaumsitingina upp í hendur, tá ið núverandi Tórshavnar Musikkskúli varð settur á stovn í 1985. Má tó siga, at eg var ivasamur um avgerðina at seta ein ikkimusikara til eisini at hava tónleikaligu ábyrgdina av musikkskúlavirkseminum í høvuðsstaðnum. Men í sama viðfangi skal største dentur verða lagdur á, at í mínari 13-ára virkistíð í musikkskúlaheiminum hevði eg ongan betri starvsbróður í tí umsitingarliga enn Napoleon Nólsoy. Ikki bara var hann altíð vinsælur at koma á tal við, men hansara lutur lá ongantíð eftir, tá tøk skuldu takast, tað veri sær í tí praktiska so væl sum í tí fíggjarliga. Tú kundi líta á Pola og hansara fólk – ja stutt sagt hevði tað verið sera trupult hjá landsleiðaranum í hansara musikkskúlaliga einsemi uppi á Landsskúlafyrisitingini at framt nakað størri musikkskúlatiltak uttan tann stuðul og ta undirtøku, sum hann fekk frá musikkskúlanum á Frúutrøð.

Fyri hetta títt beinasemi og fyri, at eg – eins og øll onnur, sum komu á gátt hjá tær – altíð møtti persónligari vælvild, vil eg fegin takka tær hjartaliga, Poli, nú eisini tú hevur lagt frá tær, og vit báðir eru vorðnir starvsbrøður av nýggjum.

Men tað var ikki bara í framferð og verumáta, at Napoleon dugdi at skapa eitt hugnaligt lag uttan um seg. Hann hevði eisini ans fyri umhvørvinum og tá ikki minst tí søguliga. Hugaligt er tað tí at koma inn á musikkskúlagongina á Frúutrøð, har tónleikasøga býarins í stóran mun hongur avmyndað á bróstinum. Og her komi eg til eitt hugskot, eg havi havt leingi. Tað hevur hesa forsøgu:

Tá ið vit vóru savnað til okkara fyrstu vertskapligu musikkskúlasamkomu á Hotel Hafnia í september 1985, kom hotelstjórin Christian Restorff so blíðoygdur inn í høllina. Sum kunnugt er tað so, at eins og tey í Bøhmen, har Sebastian Bach hevði sítt ættarupphav, tosaðu um ein bach sum synonymt heiti fyri ein musikara, soleiðis hevur tónleikur altíð verið knýttur at Restorff-navninum. So eisini við Christiani Restorff, ið var eitt sera musiskt menniskja og ein av býarins fremstu fiólspælarum. Christian frøddist um tann musikkskúlaliga vøkstur, sum Royndarmusikkskúlin hevði havt við sær, og tá nú føroyski musikkskúlin sum nýskipaður stovnur var komin á gátt hjá honum, vildi hann fegin lata okkum eina symbolska gávu. Tað var hesin pinnurin.

Hetta er taktstokkurin (Ólavur Hátún handaði nýggja leiðaranum á skúlanum hann í varðveitslu, blaðm.) hjá Jóhan Restorff, vanliga kallaður Jan, ið var systkinabarn Christian, farbróður systkini Rigmor, Ebbu, Trygva og Andrias Restorff og mammubeiggi William Heinesen. Uttan at fara ov langt út í skyldskapargreiningina kann her eisini nevnast, at hann var langabbabeiggi Bjarna Restorff.

Um hann skrivar William Heinesen, at hann var »som en ældre broder ...var udpræget musikalsk, spillede violin, havde en smuk baryton og var sjælen i mange musikforetagender, både sanglige og instrumentale«. Og so greiðir William frá, at hann eins og hini systkini sang við í kórinum hjá Jan og var m.a. við til konsert á náttartíð í bakarínum hjá Franz, beiggja Jan. Um tað, tey sungu, tekur William Heinesen soleiðis til: »Den hyggelige og ungdommeligt sprudlende musik vil for mig altid være knyttet til erindringen om det natlige bageri med dets duft af wienerbrød og Johans drengeagtige iver.«

Eisini M.S.Viðstein umtalar Jan Restorff sum ungan, eldhugaðan og vinsælan mann, ið tók yvir í so mongum í tónleikalívinum, tá ið Bager Hansen var farin at eldast, t.d. sum dirigentur og sum fyrsta violin í strúkikvartettini. Eisini sang hann so væl og vakurt til konsertir, har Carolina, mamma William Heinesen, altíð sat trúgv og hugagóð við klaverið, skrivar Maurentsius í sínari bók »Horvnar havnarmyndir«.

Henda taktstokkin havi eg ofta hugsað mær við okkurt høvi at kunna latið Tórshavnar Musikkskúla, tí hóast tað var sum landsmusikkskúlaleiðari, eg fekk hann í varðveitslu, so er tað fyrst og fremst Tórshavnar tónleikasøgu, hann er knýttur at.

Tá so Bo Isholm í gjár segði mær, at hátíðarhald fór at verða í dag í sambandi við fráfaringina hjá Napoleon, datt mær straks í huga, at hetta mátti vera løtan. Tí ikki bert kundi ein slíkur gestus vera við til at seta endurminnandi dám á hesa fráfaringarløtu, men hetta er samstundis høvi til við góðynskjum at handa taktstokkin til nýggja musikkskúlastjóran, ið sum abbasonur gitna mentamannin Kristin í Geil hevur sínar røtur júst aftur í hetta livandi tíðarhvarv í býarins mentanarsøgu.



*Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn, takkar Napoleon Nólsoy fyri drúgva – kommunala – tænastu*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*



*Musikkskúlastjórar… Martin Mouritsen, stjóri í Føroya Musikkskúla, Napoleon Nólsoy, fráfarni stjóri í Tórhavnar Musikkskúla og Ólavur Hátún, fyrrverandi stjóri í Føroya Musikkskúla*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*